## Tónleikur

**GUITAR**
Eg havi sett ein guitar í svørtum guitarposa frá mær onkustaðni í Havn. Er tað onkur, sum veit um hann? Hann er reyðligur við einari sprekku í kassanum. Finnaraløn verður latin.
*Tlf. 319604 ella 250298, Bjarki*

**TIL SØLU**
5.1 Dolby Digital Surround system. 6x100w Technics forsterkari. Kenwood DVD spælari. 2 Infinity 3-way hátalarar. 2 KEF satelitt hátalarar kr. 7500,-
*Tlf. 221614, aan@farodane.fo*

**TIL SØLU**
EV hátalarar, 2 stk. bassar + káplar, 2 stk. toppar + káplar.
*Tlf. 255569*

**TIL SØLU**
Studio mix pultur, 16 kanalir, væl egnaður til live og studio brúk.
*Tlf. 255569*

**TRUMMUSETT TIL SØLU**
Gott Pearl trummusett til sølu. Hevur verið brúkt á nógvum fløgum. Selist til hægstbjóðandi.
*Tlf. 228063, James Olsen*

**EL-GUITAR TIL SØLU**
Óbrúktur 1/2 ára gamal Yamaha AEX500 hálv-akkustiskur guitar við tveimum innb. mikrofonum (Magnetic Pickup og Piezo Pickup), einum 15 W VOX forsterkara og fótstativi til sølu. Ljóðar einastandandi. Til sølu samlað fyri einans 4500 kr.
*Saltangará, tlf. 260590*

**GOTT ORGUL TIL SØLU**
Domus-Pastorale við pedalum og beinki. Verður selt vegna keyp av keyboard.
*Tlf. 442181*

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Digitalur satelitt móttakari við skermi og høvdi bíliga til sølu.
*Tlf. 226511 eftir kl. 16*

**SJÓNVARP**
Eitt 4 ára gamalt Lumatron 28" sjónvarp til sølu fyri 2.000,- kr.
*Tlf. 314371/284013*

## Ymiskt

**SAMSUNG-N620**
Til sølu er ein lítið brúkt Samsung SGH-N620. fyri 1100 kr. nýprísur 2500 kr. Telefonin er eitt ár.
*Tlf. 211648 & 441548*

**ER TAÐ NAKAR**
sum fer niður við Norrønu til Danmarkar tann 30. oktober, ið kann taka bil mín við til Keypmannahavnar.
*Vinarliga ringið tlf 455845 - 60944070*

**DANSKE PIGER**
på Færøerne mødes 15. nov 2003 kl. 10-16. Tilmeldingsfrist 5.nov. Yderligere information:
*315572, 317081, 328045 eller danske-piger@email.fo*

**NÝGGUR OG LÍTIÐ BRÚKTUR**
fitnessbonkur til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur 4.000 kr. Kann nýtast til flest allar styrkivenjingar.
*Tlf. 250683 eftir kl. 17*

**TIL SØLU**
Handilsinventar bíliga til sølu. Áhugað kunnu ringja
*tlf. 223527*

**BÍLIGUR STIMI**
Nýggjur stimi bíliga til sølu fyri 450,- Ring helst millum kl. 8-11.30 ella aftaná kl. 22.30.
*Tlf. 318096*

**MYRKAKAMAR ÚTGERÐ**
til framkalling av svart/hvítum myndum til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 251525*

**INNITRAPPUR YNSKJAST**
Hædd millum gólv niðara og gólv ovara 2.60 m. Breidd 80 cm.
*Tlf. 573875*

**TIL SØLU**
2 gl. rosa hondvøsk við amaturum í borðplátu, 204 cm. Eitt wc, gl. rosa, eitt kompl. brúsuamatur. Prísur kr. 2.500,-
*Tlf. 317862 eftir kl. 18*

**RECURVE BOGI**
Samick SNT 68" 32# við pílum og øðrum tilhoyri kr. 1700,-
*Tlf. 221614, aan@farodane.fo*

**HARUHAGI TIL LEIGU**
Norðhagi í Kunoy verur seldur í Bygdarhúsinum í Kunoy fríggjakvøldið 31/10-03 kl. 19.00.
*Hagastýrið*

**NOKIA 7650**
Ein Nokia 7650 við kamera og bluetooth. Lítið brúkt. Eyka útgerð: Taska og battarí. Nýprísur: 6199,- + tasku og battarí. Til sølu fyri: 4000,- kr.
*Tlf. 253475*

**PANASONIC GD87**
& SonyEricsson T610. Báðar eru spildurnýggjar, hava litskerm, digitalkamera, MMS, GPRS, WAP, spøl,kalendara og mangt annað. Til sølu fyri 2.500 pr. stk.
*kd@post.olivant.fo*

**BASARUR**
verður í KFUK í Havn hósdagin 6. nov. kl. 19.00 við eydnuhjóli, borðsølu, fiskibrunni, køkutombola, loppumarknaði og konditaríi. Vit taka við tøkk ímóti lutum.
*KFUM, Varðagøta 9*

**MIÐVINGAR ÚTI OG HEIMA**
Bygdaveitslan 8. nov. verður av ongum.
*Gleimur*

**BRÚKTAR INNHURÐAR**
8 stk. innhurðar, ein við rúti, í góðum standi, til sølu fyri 200 kr. stk.
*Tlf. 443111*

**BRÚKT ÚTHURÐ**
H. út, 1,20x2,05, til sølu.
*Tlf. 314018*

**KANN NAKAR**
selja mær 3 vindeygu stødd ca. 45 x 45 cm. í træ ella plastikk.
*Tlf. 311199*

**BRENNIOVNUR TIL SØLU**
Lítil brenniovnur til sølu. Er ongantíð brúktur.
*Tlf. 510042*

**KEYP TIL JÓLAPAKKAKALENDARAN**
24 sera góðar lutir fyri einans 500,- t.v.s. ca. 20,- dagin, harumframt verður drigið um 3 gávukort á 500,- frá BR-leikur ímillum allar seldar pakkar. Ring og bílegg áðrenn 10. nov. Selt verður kring alt landið.
*tlf. 220443*

**POST- OG TELEFONKORT**
Eg eiti Veronika. Eg samli uppá postkort og telefonkort frá Føroyum og restina av verðini. Um tú hevur nøkur, sum tú kundi givið mær, hevði eg verðið glað. Tú kanst senda tað ella ringja til mín. Takk fyri. Veronika Hassova, Bókbindaragøta 7, 100 Tórshavn.
*Tlf. 227424*

**GPS TIL SØLU**
Ein berbarur Garmin E-Trex GPS (enskan tekst) sum spildurnýggjur. Nýprísur 1.995 kr. til sølu fyri 1.200 kr.
*Tlf. 318675*

**FRÁ SUMBIAR ÍTRÓTTARFELAG**
Basarur verður í samkomuhúsinum fríggjadagin 7. november. Tey, ið vilja stuðla við einum luti, kunnu lata hann til ein av nevndarlimunum, Rúni tlf. 370531, Torri tlf. 370541, Magnus tlf. 370368, Tova tlf. 370885, Marianna tlf. 370011
*Sumbiar Ítróttarfelag*

**TÚ,**
sum koyrdi á bil okkara uttanfyri Sandavágs kirkju við jarðarferðina fríggjadagin 17. oktober, vinarliga, vend tær til okkum á
*tlf.nr. 333399*

**TIL SØLU**
Cats & Dogs DVD filmur 200,- kr. 1 Playstation spæl 100,- 3 Playstation II spøl 250,- kr. stk. 2 PC-spøl 200 kr. pr. stk.
*Tlf. 315221*

**PLASTIKHURÐ**
Ein plastikhurð, svørt, 80 x 210 cm. til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 421142*

**TIL SØLU**
WC-kumma og 2 hondvøsk sera bíliga til sølu.
*Tlf. 328025/316748*

# Hjálpartólamiðstøðin miðdepil fyri ráðstevnu

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum hevur tøkniliga deildin á Hjálpartólamiðstøðini (HTM) í Føroyum vitjan av rehabtøkningum frá øllum amtshjálpartólamiðstøðunum í Danmark.

Í 1988 bleiv HTM sett á stovn í Føroyum, og har starvast í dag 13 fólk. Í 1994 var HTM lagt undir Almannastovuna, og virkar HTM í dag sum deild av Almannastovuni.

HTM er skipað við 4 arbeiðsøkjum: Fyrisiting, faklig málsviðgerð, goymsla og tøkni. Á tøkniligu deildini starvast í dag 2 maskinmeistarar við servitan í rehabtøkni.

Uppgávurnar hjá rehabtøkningunum er ein blandingur av umsitingarligum uppgávum og útførandi arbeiði, m.a. tillaging, projektering, viðlíkarhald og umvælingar av hátøkniligari útgerð, so sum persónslyftum, elevatorum, elkoyristólum og aðrari útgerð. Eisini er ein av uppgávunum í samráði við fakligar málsviðgerarar, at ráðgeva privatum og almennum virkjum, tá talan er um tøknilig hjálpartól og atkomuviðurskifti.

Umsitng av útlæntum hjálpartólum er ein rættuliga stór uppgáva, tá hugsað verður um, at tað síðan 1988 hevur verið veittur stuðul á hjálpartólaøkinum fyri góðar kr. 100 milliónir.

Tað finnast í dag umleið 15.000 ymisk tól á marknaðinum. Tólini, ið tøkniliga deildin á HTM umsitur í dag, eru sera fjølbroytt. Tey fevna um alt frá sertillagaðum dósaopnarum, høkjum, nógvum ymiskum lyftum og elevatorum; elkoyristólum útgjørdir við alskins tøkni, ið kann tráðleyst arbeiða saman við teldum, lata hurðar upp og enn tá verða útgjørdir við respiratori, so fólk kunnu anda, um tað er trupuleikin.

### Samstarv

Sum skilst av omanfyristandandi, er øki sera fjølbroytt og torgreitt. Sera umráðandi er tí at fylgja væl við tí sum fyriferst á hesum økinum. Fyri at náða hesum setningi, var sett á stovn eitt samarbeiði millum amtstøkningarnar í Danmark. Fyri seks árðum síðani, fekk HTM møguleika at taka lut í hesum samarbeiði, og síðani hevur tøkningurin á HTM tikið lut á ársfundinum hjá amtstøkningunum. Umframt árliga fundin, er hetta samstarvið útbygt til eisini at fevna um eina samskiftisbasu á alnótini, ið Hjælpemiddelsinstitutter (HMI) í Danmark umsitur.

Tá vit hyggja út um landoddarnar og sambera okkara hjálpartólaskrá við hana í øðrum londum, tá er eingin ivi um, at vit eru sera væl við tøkniliga. Arbeiði við hjálpartólum í Føroyum hevur í nógv ár verið sera tungt. Men við einum miðvísum arbeiði seinnu árini bæði frá stovnum, áhugafeløgum politikkarum, og ikki minst teimum rørslutarnaðu sjálvum, er tað eydnast at venda hesi gongd.

Játtanin til hjálpartólaøkið er økt seinastu árini, og hevur hetta veri við til at betra munandi um tænastuna til borgaran. Hetta hevur ført við sær, at hugburðurin mótvegis hesum øki, er vorðin positivur, og er tað at frøast um.

Í sambandi við ár teirra brekaðu, hava tøkningarnir á HTM miðvíst arbeitt við at fáa ársfundinum hjá amtstøkningunum í Danmark til Føroya og á henda hátt er HTM við til at taka ábyrgd fyri samarbeiðinum á hesum øki.

# Nýggjur sáttmáli

**Semja millum Føroya Handverkarafelag, Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið**

SÁTTMÁLI
*Tíðindaskriv*

Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna á aðrari síðuni og Fíggjarmálaráðið á hinari skrivaðu mánadagin undir semju.

Nýggi sáttmálin hevur gildi frá 1. oktober í 2003 til 1. oktober í 2005, og karmurin er umleið 9%.

Lønin hækkar 7,25%. Vaktargjøldini hækka somu prosent sum lønin. Eftirlønin hækkar 2%.

Avtala er eisini gjørd um førleikamenning.

# Meiri popplist

**Hósdagin kemur nýggj føroyska savnsfløga út. Tað er onnur fløgan í røðini Popplist**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Í fjør var útgávan Popplist ein stórseljari á fløgumarknaðinum, og tað hevur ivaleyst givið útgevaranum hug at royna aftur við líknandi fløgu.

Tað er 3'arin, sum stendur fyri Popplist-útgávuni, og hósdagin kemur onnur fløgan í røðini.

Á fløguni eru kendir føroyskir poppsangir – bæði eldir og nýggjari.

Hesaferð eru 19 sangir við, og tað er alt frá Guðrun Sólju Jacobsen, Brandur Enni, Chase og Moirae til Safir, Les Isles Feroe, Kára P og Elin Heinesen.

Onkrir av sangunum hava ongantíð áður verið útgivnir, hóast teir hava verið nógv at hoyra í útvarpi.

Á móttøkuni, sum verður í 3'aranum hósdagin, fara Páll Finnur Páll at spæla. Teir hava sjálvir ein sang við á útgávuni.



*Ein av nýggju sangunum hjá Guðrun Jacobsen er við á Popplist 2*



## HEILSANIR



**Góðu systrar**
Hjartaliga tillukku við døgunum. Her eru vit fittar. Gleði meg til hálvan november.
**Bestu heilsanir lítla systir**



**Góði allarbesti Poul gubbi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 16 ára degnum í dag og nógv góð ár í framtíðini.
**Heilsan Ári, Martin og Petur Ovi**



**Góða Katrina**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum í dag. Alt gott verður ynskt tær.
**Kærastu heilsanir frá ommu og abba**



**Góða Beinta**
Lukku og gleði á tínum 6 ára føðingardegi. Gleða okkum at koma norður.
**Heilsan omma, abbi og Meinhardgubbi**



Um tit trúgva tí ella ei, so blívur hesin sjeikurin 50 ár í dag. Vit ynskja honum hjartaliga tillukku.
**Heilsan vit**



**Góða Katrina**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Gleði meg at koma í føðingardag.
**Heilsan Cæsar**



**Elskaði Jóhan Emil**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Ynskja Dagmar, mamma og babba**



**Góði pápi og abbi**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum tann 29. okt.
**Ynskja Bárður, Rógvi og Rósa**



**Góða Anita og Durita**
Hjartaliga tillukku við 8 ára døgunum.
**Heilsan mamma, babba, Magni og Súni**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum 29. okt. Eisini ein heilsan til ommu. Takk fyri alt tit eru fyri okkum.
**Ynskja Rókur og Rani**



**Til verðins fittasta babba**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum, sum var tann 27. okt.
**Heilsan Marin, Jóhanna, Buddy og Knuddy**



**Hey góði**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum.
**Heilsan eg á myndini xxx**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Sveinur og Adrian**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ..............................................................................
Bústaður: .........................................................................
Bygd/býur: ..................................... Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:

**Sosialurin**

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«